Hesin oljupallurin hevur verið virkin á Clairfeltinum í fimm ár. Oljufeltið er so risastórt, at nú verður arbeitt við at byggja út við enn einum oljupalli



# BP útbyggja fyri 35 mia. kr við markið

**Stórar útbyggingarætlanir liggja fyri framman í økinum millum Hetland og føroyska markið. BP arbeiðir við eini ætlan at byggja út Schiehallion feltið og eina enn størri útbygging av Clair oljukelduni fyri nærum 35 milliardir krónur komandi árini**

OLJUÚTBYGGING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Bretski oljurisin BP arbeiðir við ætlanum um at brúka 35 milliardir krónur í útbygging av verandi Schiehallion oljukelduni vestan fyri Hetland og øðrum útbyggingarstigi av risa oljukelduni Clair. Mett verður at Schiehallion, ið liggur skamt frá føroyska markinum, kann framleiða olju heilt fram til 2035 eftir hesa útbygging, meðan Clair Ridge útbyggingin kann vara í meira enn 40 ár frá 2015.

Clair oljufeltið varð funnið í 1977 men ikki fyrr enn í 2005 varð farið undir at framleiða olju frá Clair. Schiehallion, sum er ein tann største oljukeldan í bretskum øki sum held, byrjaði framleiðsluna í 1998.

Mett verður at útbygging av Schiehallion og Clair verða góðkendar í 2011 og 2012.

Myndugleikarnir í Hetlandi fegnast um ætlaninar hjá BP og vóna, at hetta eisini fer at koma Sullom Voe oljuterminalinum til góðar.

Eins og við avgerðini hjá Total at fara undir útbygging av gassfeltum, so hevur tað eisini alstóran týdning fyri BP, at bretskir myndugleikar hava gjørt av at lækka skattin fyri nýggjar útbyggingar av olju- og gassleiðum vestan fyri Hetland.

Taka við aftrat útbyggingarætlanunum hjá Total og BP vestan fyri Hetland eisini aðrar komandi úbyggingar so sum Rosebank hjá Chevron og Statoil, Cambo hjá Amerada Hess og uppaftur aðrar útbyggingar, so fara íløgurnar komandi árini skjótt at røkka teimum 100 milliardunum. Nakað, sum so aftur kann vera duraopnarin til íløgur á føroyska landgrunninum eisini.

---



*Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi heldur tað vera nærum ófatiligt, sum nú hendur vestan fyri Hetland og hann vónar, at vit eisini skjótt verða partur av øllum hesum spennandi og mennandi virkseminum*

# Gassútbygging góð fyri Føroyar eisini

**Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi fegnast, nú tað frættist, at loksins er avgerð tikin um at byggja út gassleiðir vestan fyri Hetland. Hann dylur ikki fyri, at hetta kann eisini hava jaligar avleiðingar fyri virksemið okkara megin markið.**

GASSÚTBYGGING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Sum so mangan sagt, so síggja oljufeløgini økini báðumegin markið meira ella minni sum eina og somu »provins«. Herfyri kom fram, at bretska stjórnin hevði gjørt av at lækka skattin, har talan var um at fáa gongd á útbygging av gassleiðum. Og hetta heldur Petur Joensen vera áhugavert.

## Positiv fyri okkum

– Tá virksemi tekur seg upp – tað veri seg bretsku megin ella okkara megin markið – so er tað gott fyri »provinsin«, t.d. sýnist tað sum at útbyggingarætlanin hjá Total av gassleiðingini til Hetlands hevur havt betri útlit fyri at verða framd, nú skatturin verður lækkaður. Og tann útbyggingin kann eisini vera positiv fyri oljuleitingina her um okkara leiðir – ella skuldi kanska sagt gassleitingina um so verður, at henda leiðingin kann verða nýtt til at flyta gass av Føroyaøkinum, og landsstýrismaðurin annars loyvir tí. Tess betri infrakervi, tess minni forðingar fyri at fara undir leiting bæði okkara megin og bretsku megin. So tað verður sera spennandi at síggja, hvørja ávirkan hetta fer at fáa, sigur stjórin á Jarðfeingi.

## Føroysk vinna lut

Her er so talan um eina so mikið stóra útbyggingætlan, at stjórin á Jarðfeingi heldur, at kanska áttu føroyskir veitarar av vørum og tænastum til kolvetnisvinnuna at ligið framvið og kannað møguleikarnar. Fjarstøðan er ikki long, og fleiri føroyskir veitarar hava prógvað sítt dugnasemi, so teir hava eitt gott útgangsstøði í so máta.

– Umframt hesa stóru ætlan hjá Total og DONG skilst, at eisini aðrar útbyggingarætlanir eru vestan fyri Hetland. Hetta hevur heilt vist við sær, at fleiri feløg fáa eyguni upp fyri økinum.

So tíðindini úr Bretlandi eru góð. Og higani eru sanniliga eisini góð tíðindi, nú tríggir brunnar standa fyri framman á Føroyaøkinum. Alt í alt eru útlitini fyri leitivirkseminum á hesum leiðum hugalig heldur Jarðfeingisstjórin.